


*Lýsingin frá Føroya Lívstrygging munti lítið á samfelagsmøtunum. Her snúði tað seg meira um at tryggja ævigt lív eftir deyða*

# Avgerðin er tín

SAMFELAGSMØTI
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Fyri fólk uttanfyri Brøðrasamkoma er tað ikki altíð lætt at síggja hvat tað er fyri eitt møti ein kemur á, men tað er stórur munur á møtunum. Sunnudagin klokkan fýra var talar um eitt sokallað uppbyggingarmøti, har tað góða orðið verður lagt fram til eggjan og umhugsunnar.

Seinna møti klokkan sjey aftan á nátturðan var eitt evangelistk møti og tað var heilt ørvísi. Orðið var borið fram, men appellin var nógv kraftigari til tann einstaka. Hetta var løtan, tá fólk skuldu velja. Nú skuldi tann einstaki gera av um hann var frelstur ella ikki.

– Er nakar her í kvøld, sum fer avstað aftur av hesum møtinum ófrelstur, so er lítið komið burturúr fyri hansara viðkomandi. Men er hann frelstur, so er nógv komið burtur úr fyri hansara viðkomandi, segði Jeffri Justinussen, sum bjóðaði væl komin á møtinum.

– Men er onki hent, so er talan um líkasælu, so er tað komið í drag, tí evangeliið hava vit hoyrt. Vit kunnu ikki siga, at vit ikki kenna evangeliið. Tú bíðar kanska eftir eini lagaligari løtu ella einum betri boðskapi, men boðskapurin um evangeliið verður ikki ørvísi. Avgerðin er tín. Tak í móti Harranum í kvøld, segði Jeffri Justinussen, tá hann byrjaði møti.

## Atgongd til dýrdina

– Ongin kann gjalda fyri at sleppa inn í himmalska staðin. Tann vegin sleppst bara í gjøgnum Gud. Vit sleppa bara til himmalska staðin gjøgnum Gud. Gud hevur sáttað seg við menniskjuna gjøgnum Jesus og uttan menniskjannar hjálp.

– Vit eru nógv savnaði her í kvøld. Og vit fara ongantíð aftur øll at vera savnaði saman aftur í hesum lívi. Fólk doyggja og komandi ár fara tað at vera fólk í millum okkum í kvøld, sum ikki eru til longur, tey eru deyð. Tí er frelsunnarspurningurin álvarsamur, segði Símun á Torkilsheyggi.

# Mettaðu 2000

SAMFELAGSMØTI
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Ein tjokkfull ítróttarhøll. Fólk hava sitið í hálvan annan tíma og lurtað eftir einum uppbyggingarmøti. Klokkan er hálvgum seks, døgurin er sodnaður og svong er á fólki, á 2000 fólkum. Og so verður boðið til nátturða, jú tit hoyrdu rætt, heitt verður á fólk um ikki at fara heim, men bíða eina løtu, tí nú verður nátturði borðreiddur. Hvar kemur maturin frá og hvussu bera tey seg at?

Hetta er næstan sum við Genesaretsjógvin í gomlum døgum, tá fýra túsund og fimm túsund vóru í somu støðu. Tá var sjálvur Meistarin hjástaddur og hann gjørdi undur og fiskur og breyð fleirfaldaðust og tá øll vóru mett, var stórt avlop. Í kvøld verður borðreitt við leskiligum smyrjibreyði. Feitari rullupylsu, soltnari rullypyldu, skerpikjøti, royktum laksi, gravaðum laksi og øðrum leskiligum. Ein rúgva av tvíflísum við leskiligum blandi innan. Matarskráin er munandi meira fjølbroytt enn á Jesusar døgum og føroyingar høvdu ivaleyst snerkt at matarskránni við Genesaretsjógvin, fiski og turrum breyði.

Í kvøld er ein forklároing upp á hvar maturin kemur, men organisatiónstalentið hjá Brøðrasamkomuni minnir næstan um eitt undur, og nú skulu tit hoyra:

– Vit hava gjørt hetta í nøkur ár og alt breyðið kemur frá fólkum í samkomuni, tey smyrja og gera til heima og síðan verður tað borið í ítróttarhøllina, sigur Mariann Restorff Eldevig, sum samskipar mattiltakið saman við eini



*Mariann Restorff Eldevig stýrdi øllum kvinnunum, sum skuldu metta tey 2000, við kønari hond*

aðrari, sum eg gloymdi at spyrja navnið á.

## Listi í Ebeneser

Marianna er kvik og tað stendur nógv á henni, tá vit hitta hana aftanfyri, har breyðbakkarnir standa og skulu berast út. Uttanfyri, inni í høllini, hoyrist rumblið af fólki, sum hava reist seg, nú seinnapartsmøtið er liðugt. Tað eru eini 50 fólk, sum bera matin út og syrgja fyri at øll gerast mett. Men Mariann er ikki heilt ókend við hotelfakið, maðurin, MC Restorff, er kendur kring alt landið, eisini sum hotelmaður.

– Tað byrjar við, at ein listi verður hongdur upp í Ebeneser. Hetta hendi fyri nøkrum mánum síðan. Har kunnu fólk melda seg til at smyrja breyð heima hjá sær sjálvum undir samfelagsstevnuni. og stendur ikki á at fáa fólk at bjóða seg fram. Alt breyðið, sum vit serverað í dag, er tilgjørt heima og smurd eru 60 rugbreyð umframt allar tvíflísarnar, sigur Marianna Restorff Eldevig.

Hvussu svevur tú um næturnar undan slíkum stórum tiltøkum?

– Eg sovi væl, tí eg veit at nokk er til, og fólk koma bara við tí besta av tí besta tey eiga, sigur hon.

– Fyrr var tað soleiðis undir samfelagsstevnunum, at fólk fór tí hús at fáa sær nátturða. Men seinastu árini hava skipað fyri náttурða millum møtini og tað hevur sínar fyrimunir. Talan er um samfelagsmøtir og tað snýr seg ikki bara um andaliga samfelagið. Tað snýr seg eisini um samfelagið millum fólk, og tá fólk sleppa frá at fara til hús, so eru ríkir møguleikar at hitta brøður og systrar undir nátturðanum.



## Færri hattar

Ein siður sum hevur verið eyðkendur fyri Brøðrasamkomuna øll árini eru teir vøkru hattarnir sum prýða kvinnurnar. Men hesin siður er um at doyggja út. Tá eg fyrstu ferð skrivaði um samfelagsmøtir fyri 10 árum, síðan taldi eg um hundrað hattar tað eina møti. Í kvøld er talið undir tjúgu.

– Hattarnir eru um at fara av mótanum, fyrr var tað ein kapping at bera vakrasta hattin, men tíðin er farin frá hattunum, sigur Mariann Restorff Eldevig.



*Deyv hoyrdu. Elligamli Hilmar Heinesen úr Miðvági hevur verið deyvur, síðan hann var borin í heim. Hann hoyrdi eisini guds orð á samfelagsmøtunum. Edny Danielsen tolkar, og Hermundur Zachariassen, sum eisini er deyvur, lýður á*



*Astrid og Jógvan Gerðalíð úr Klaksvík, altíð trúføst á møtum. Astrid ber enn hatt, hóast hattarnir fækkast á samfelagsmøtunum. Tíðin er farin frá teimum*

## Høgtíðin

Samfelagsmøtini í Havn eru størsta høgtíðin á árinum fyri mong í Brøðrasamkomuni. Tey fyrstu møtini vóru hildin í tjúgunum í farnu øld og síðan hava tey verið hildin á hvørjum ári, undantikið undir krígnum.

Fyrr vóru møtini ikki so tilrættaløgd sum í dag og ein og hvør kundi bera vitnisburð fram. Men nú eru møtini vorðin so stór, at neyðugt er skipa, tey og tí eru talararnir bidnir frammanundan.

Roynt verður at fáa talarar úr øllum samkomunum í landinum og skifta millum talarar, men tað er altíð onkur at trúboðarunum sum ganga aftur á hvørji samfelagsstevnu.

Samfelagsmøtini hava altíð liðið um hesa tíðina og tað stavar frá slupptíðini. Um hesa tíðina vóru øll skipini komin heim fyri veturin og tá bar til at savna fólk til samfelagsmøtir.

Møtini byrja mikudag og enda sunnudag. Teir fyrstu dagarnir eru møtini í Ebeneser, men um vikuskiftið rúmast fólkið ikki í Ebeneser og tí verður farið niðan á Nabb.

Tá samfelagsstevna er, er gestablídni stórt hjá fólki í Brøðrasamkomuni. Nógv avbygdafólk koma til Havnar og bæði gista og sita til borðs hjá brøðrum og systrum, meðan stevnan verður hildin.

Hetta mynstrið er nokk so nógv broytt seinni árini, sum samferðslumøguleikarnir eru vorðnir so góðir og tey sum eru nærmast høvuðsstaðnum hava møguleika at koyra í millum.

BMW 524 TD Diesel



Árg. 1990, Km. 210.000
sera vælhildin og sera økonomiskur
Til sølu fyri 80.000 kr. áðrenn MVG
(nýprísur var ca. 520.000 Kr)
Tlf 211732

Koyrið við Maersk Air

Um tú hevur ein Maersk Air bannara á bakrútinum á bili tínum, kanst tú vinna ferðaseðlar til ferðamál á rutunetinum hjá Maersk Air. Drigið verður millum luttakararnar og tey hepnu kunnu vænta sær vitjan av Maersk Air. Hava tey tá bannaran á bilinum, vinna tey.

1. vinningur – 2 ferðaseðlar til eitt ferðamál á rutunetinum hjá Maersk Air umvegis Keypmannahavn. Til dømis Athen, París, Barcelona ella Milano
2. vinningur – 2 ferðaseðlar til London
3.–5. vinningur – 2 ferðaseðlar til Keypmannahavnar/Billund
6.–10. vinningur – Ítróttartaska

Vitja eisini okkara nýggja handil á www.maersk-air.fo
Tú kanst melda teg til og heinta bannaran á skrivstovuni hjá Maersk Air í Havn. Ella vit kunnu senda hann við postinum.
Seinasta freist at melda seg til er 17. november 2003. Vinnararnir verða funnir síðst í desember 2003.
Maersk Air · Handilskjarnin · FO-100 Tórshavn · Tel.: 35 74 74 · Fax: 35 74 75
MAERSK AIR
It's got to be perfect